UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

## Letur kanska aftur

Elsti fiskamarknaðurin í Danmark, Esbjerg Fiskeauktion, letur kanska aftur. Ein annar møguleiki er, at marknaðurin í Esbjerg verður lagdur saman við einum av hinum fiskamarknaðunum í Vesturjútlandi.

Stjórin í Esbjerg Fiskeauktion, Geert Gregersen, sigur, at umstøðurnar í Esbjerg eru nógv broyttar seinnu árini. M. a. er sølan minkað niður í helvt.

## Krav til Røkke

Tað er nú greitt, at norski ríkmaðurin Kjeld Inge Røkke fær enn eitt samarmál um endurgjald í sambandi við, at hann tvingsilsloysti partabrøvini hjá teimum smáu eigarunum í felagnum Aker Maritime.

Hafslund Invest átti 671.700 partabrøv í Aker Maritime, sum Røkke var til reiðar at rinda 48 mió. krónur fyri. Men tað vil felagið ikki góðtaka og hevur nú boðað frá, at tað fer at leggja sak ímóti Røkke við kravi um munandi betri prís. Stjórin í Hafslund Invest vil ikki siga, hvussu nógvan pening tey fara at krevja, men sigur bert, at talan er um munandi meiri enn tað, sum Kjeld Inge Røkke vil gjalda.

## Dandy bretskt

Kenda danska tyggigummifyritøkan Dandy er á veg á bretskar hendur. Blaðið Sunday Telegraph skrivaði sunnudagin, at stóra bretska fyritøkan Cadbury Schweppes er til reiðar at rinda umleið fýra mia. krónur fyri Dandy.

Sum skilst vóru teir donsku eigararnir bert hugaðir at selja ein part av fyritøkuni í Vejle, men bretska tilboðið er sambært blaðnum so gott, at eigararnir nú umhugsa at selja alla fyritøkuna.

Dandy hevði í fjør góðar tvær mia. krónur í umsetningi, og roknskapurin vísti 70 mió. krónur í avlopi.

# Fransmenn fingu ein hvøkk

**Tað kom sum ein skelkur - ikki bert í Fraklandi, men í stórum pørtum av Evropa, at tann víðgongdi Jean-Marie Le Pen fekk so stóra undirtøku í fyrra umfarinum av franska forsetavalinum.**

FRAKLAND
*Árni Joensen*



*Jacques Chirac á veg út úr valhølinum sunnudagin. Veljarakanningar vísa, at hann fer at vinna greiðan sigur í seinna umfarinum*

*Mynd: Reuters*

Í París og øðrum stórum býum tustu fleiri túsund fólk út á gøturnar sunnukvøldið at vísa sína misnøgd, eftir at tað var greitt, at tann víðgongdi høgramaðurin Jean-Marie Le Pen hevði fingið nóg stóra undirtøku til t halda fram í seinna valumfarinum. Fólk róptu rakstrarróp sum "Burtur við Le Pen" og "Nei til fascismu".

Sitandi forsetin, Jacques Chirac, vann fyrra valumfar við 19,67 prosentum av atkvøðunum, og Le Pen var næstur honum við 17,02 prosentum. Valevnið hjá vinstravonginum, tann sosialistiski forsætisráðharrin Lionel Jospin, fekk 16,07 prosent og gjørdist tískil ov stuttur.

Beint eftir at úrslitið var almannakunngjørt, boðaðu muslimskir og jødiskir felagsskapir í Fraklandi frá, at teir fara at mæla sínum limum til at atkvøða fyri Chirac á seinna valumfarinum, sum verður tann 5. mai.

- Vit mugu venda høgrarákinum og forða Len Pen í at fáa valdið, segði Clement Yana, sum er formaður í jødiska felagsskapinum í Marseille. Hann legði afturat, at hetta er fyrstu ferð, at felagsskapurin hevur mælt sínum limum til at atkvøða fyri einum ávísum valevni.

Talsmaðurin hjá teimum islamisku felagsskapunum, Mohammed Laqhila, segði í gjár, at allir franskir muslimar eiga at atkvøða fyri Chiraq tann 5. mai.

### Jospin gevst

Tað var ein sera vónsvikin Lionel Jospin, sum sunnukvøldið noyddist at ásanna, at hann hevði tapt valið. Hann nýtti samstundis høvi til at biðja sínar veljarar velja Chiraq í seinna umfarinum. Jospin, sum er forsætisráðharri, segði eftir ósigurin, at hann nú fer at taka seg burtur úr fronskum landspolitikki.

Eygleiðarar í París siga tað vera heilt greitt, at Jacques Chirac fer at vinna seinna valumfar og harvið forsetavalið. Ein veljarakanning, sum varð gjørd sunnukvøldið, vísti, at heili 78 prosent ætla sær at atkvøða fyri sitandi forsetanum tann 5. mai. 22 prosent svaraðu, at tey fara at seta krossin fyri Le Pen.

# SPD fekk ein frammaná

**Tann konservativi CDU vann stórsigur á landspartavalinum í Sachsen-Anhalt**

TÝSKLAND
*Árni Joensen*

Sosialdemokratiski stjórnarflokkurin í Týsklandi, SPD, var fyri einum eyðmíkjandi ósigri á landspartavalinum í Sachsen-Anhalt um vikuskiftið. Flokkurin hevur havt valdið í landslutinum seinastu átta árini, men noyddist nú at lata teimum konservativu í CDU valdið.

CDU fekk heili 37,4 prosent av atkvøðunum, meðan SPD, sum fekk meiri enn 35 prosent á seinasta vali, fekk bert 19,9 prosent hesaferð. Eygleiðarar vænta, at CDU fer at leita sær samgongustuðul frá teimum liberalu Frídemokratunum, sum trífaldaðu sína undirtøku og fingu 13,3 prosent av atkvøðunum. Eydnast hetta, fáa teir konservativu meiriluta í yvirhúsinum í Bundesrat, har allir teir 16 landslutirnir eru umboðaðir, og teir kunnu tá steðga lógaruppskotunum hjá stjórnini í Berlin.

Kanslaravalevnið hjá CDU, Edmund Stoiber, var skjótur at gera sær dælt av valúrslitinum í Sachsen-Anhalt.

- Hetta er eitt álvarssamt tekin og ein stórur ósigur fyri búskapar- og arbeiðsmarknaðarpolitikki n hjá Schrøder-stjórnini, segði Edmund Stoiber. Eygleiðarar eru eisini á einum máli um, at úrslitið er ein ávaring til Gerhard Schrøder og sosialdemokratarnar upp undir ríkisdagsvalið, sum verður í september.

Hinvegin halda eygleiðarar ikki, at CDU-sigurin í Sachsen-Anhalt skal tulkast sum ein sigur fyri Edmund Stoiber. Sachsen-Anhalt er partur av gamla Eysturtýsklandi, og Stoiber er ikki serliga høgt í metum har, siga eygleiðararnir.

Úr Norðurlondum:

## Nóg mikið

Í Danmark hevur stjórnarflokkurin Vinstri boðað frá, at hann fer ikki at tátta útlendingapolitikkin meiri, soleiðis sum stuðulsflokkurin hjá stjórnini, Danski Fólkaflokkurin, hevur sett sum treyt fyri at taka undir við fíggjarlógini.

Forkvinnan í Danska Fólkaflokkinum, Pia Kjærsgaard, hevur sagt, at vil stjórnin ikki tátta útlendingapolitikkin meiri, er flokkur hennara til reiðar at samstarva við sosialdemokratarnar um eitt nú vælferðar- og arbeiðsmarknaðarpolitikkin.

Framsøgumaðurin hjá Vinstra í fíggjarmálum, Kristian Jensen, sigur, at flokkurin letur seg ikki trýsta. Hann heldur, at tann útlendingapolitikkurin, sum stjórnin hevur lagt til rættis, eigur at sleppa at standa sína roynd, áðrenn talan kann verða um at tátta hann uppaftur meiri.

## Dýrt frímerki

Eitt norskt frímerki, sum bleiv skrivt prentað í sambandi við eina umlegging í 1906, varð um vikuskiftið selt í Oslo fyri 52.000 norskar krónur. Eigarin ætlaði sær at fáa 30.000 krónur fyri tað lítla frímerkið, men tá saman um kom, kom hægsta boðið upp á 52.000 krónur.

Eitt bræv, sum Vidkun Quisling hevði sent til Eysturhermótið í 1944, var millum lutirnar á uppboðnum leygardagin. Áhugin var so sum so, og at enda fór brævið fyri 1.500 krónur.

## Søkja ikki arbeiði

Bert tvey av hvørjum tíggju í Keypmannahavn, sum fáa arbeiðsloysisstuðul, gera nakað fyri at fáa arbeiði. Tey, sum hava kannað viðurskiftini, siga, at tey flestu arbeiðsleysu í høvuðsstaðnum vilja fegin hava okkurt at gera, men at tey leggja ikki í at søkja, tí tey vænta ikki at fáa nakað arbeiði kortini.

Umleið 30.000 keypmannahavnarbúgvar fáa arbeiðsloysisstuðul, men nú hevur kommunan sett sær fyri at gera nakað ítøkiligt fyri at fáa sum flest teirra til arbeiðis.

# ítróttur

Nr. 76 • týsdagur • 23. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Spennandi fjórðingsfinalur

**Bæði HB og GÍ fingu grannauppgerðir á heimavølli, tá lutur varð kastaður um fjórðingsfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið sunnudagin**

LUTAKAST
*Jákup Mørk*

Í Ítrottatíðindunum í Útvarpinum skuldi lutur kastast um fjórðingsfinalurnar í steypakappingini hjá monnum.

Seinasti dysturin í bólkaspælinum varð avgreiddur í Vági, og eftir at VB hevði vunnið hendan, var greitt, at liðini, sum skuldu hava heimavøll í fjórðingsfinalunum vóru VB, NSÍ, HB og GÍ.

Hesi skuldu so parast við ávíkavist B36, EB/Streymi, FS Vágum og B68, men tó so, at eingin fjórðingsfinala kundi verað millum lið, sum høvdu verið í sama bólki í innleiðandi umførunum.

### Tvær grannauppgerðir

Tá lutakastið var av, kundi útvarpsmaðurin lesa upp, hvussu dystirnir í teimum fýra fjórðingsfinalunum verða leiktir, og einki er at ivast í, at spenningurin um hálvfinalusessirnar verður størstur í tveimum av hesum.

Í Gøtu verður talan so avgjørt ikki um nakra lætta uppgávu hjá heimaliðnum, tá B68 kemur á vitjan. GÍ slapp hampuliga væl ígjøgnum sín innleiðandi bólk, men tað er uttan iva ein meinbogi fyri gøtumenn, at teir enn ikki hava leikt teljandi dystir móti liðum, sum á pappírinum verða roknað millum tey sterkastu í landinum. Her hava toftamenn longu tveir dystir móti ávíkavist KÍ og HB í beinunum, so á fyrireikingarstøðinum eru toftamenn helst nakað betri fyri enn GÍ.

VB ognaði sær rættin til heimavøll við sigrinum á B36, og uttan iva eru vágbingarnir greiðir favorittar, tá teir fáa vitjan av EB/Streymi í sínari fjórðingsfinalu. Spælið hjá VB móti B36 gav eisini ábendingar um, at VB nú er um at koma veruliga fyri seg, og tað tykist í øllum førum sannlíkt, at luttøkan hjá EB/Streymi í steypakappingini endar í Vági.

Í Havn verður aftur í ár grannauppgerð. Hetta er triðja árið á rað, at tey bæði havnarliðini skulu royna at taka hvørt annað úr steypakappingini, og og lítið er at ivast í, at báðir partar heldur enn fegnir høvdu vilja sloppið undan at hitt júst grannarnar í fjórðingsfinaluni. Skala nakar favorittar kjósast í hesum dystinum, so má tað verða HB. Eldra havnarfelagið var sannførandi vinnari av sínum bólki, sum taldi sterk mótstøðulið, og B36 tykist ikki vera so væl fyri í løtuni, sum teir annars góvu ábendingar um fyrstu umførini.

Seinasta fjórðingsfinalan í ár verður í Runavík, har FS Vágar kemur á vitjan. Runavíkingar iðraðu seg um, at teir mistu tveir dystir í fyrireikingunum í bólkaspælinum, men móti vágamonnum tosa øll sannlíkindi fyri, at NSÌ verður ov sterkt, og at teir so smátt kunnu fara at brynja seg til eina hálvfinalu móti grannunum úr antin Gøtu ella av Toftum.

Umframt at lutur varð kastaður um, hvussu spælast skal í fjórðingsfinalunum, so er longu nú eisini gjørt av, hvussu vinnararnir í hesum hittast í hálvfinalunum, og framgongur hetta aðra staðni í síðuni.




*Soleiðis sær vegurin til Løgmanssteypið út, nú lutur er kastaður um, hvussu dystirnir skulu spælast*

# Hálvfinalurnar verða tær somu

**Eisini hjá kvinnunum er nú farið í líða heilt væl í steypakappingini, og nú er mest sum greitt, hvørji lið hittast í hálvfinalunum**

STEYPAKAPPING
*Jákup Mørk*

Tað líkist einari endurtøku av hálvfinalunum í fjør í steypakappingini hjá kvinnum.

Ta ferðina leiktu HB og KÍ sjálvan finaludystin, eftir at tey í hálvfinalunum høvdu vunnið á ávíkavist VB og B36.

Enn restar dysturin millum VB og B71 at spæla í fjórðingsfinalunum, men megnar VB í hesum at liva upp til leiklutin sum favorittur, verður talan um júst somu hálvfinalurnar aftur í ár.

### Sjey í ein hálvleik

Tað var annars nær við, at klaksvíkskvinnurnar fingu ein skelk av teimum heilt stóru, tá tær sunnudagin royndu seg móti B68. B68 var á odda bæði 1-0 og 2-1 í seinna hálvleiki, men trý mál frá Rannvá Andreasen saman við einum máli frá Malenu Josephsen syrgdu at enda fyri, at kvinnurnar úr Klaksvík ikki gjørdu monnunum kynstrið eftir við einum skjótum farvæl í steypakappingini.

Í Havn var lítil og eingin ivi, tá havnarliðini skuldu spæla sínar fjórðingsfinalur. HB hevði vitjan av NSÍ, og her gjørdist talan um stórsigur. Ikki minni enn 10-0 endaði dysturin.

Tíggju mál vóru somuleiðis munnurin, tá B36 royndi seg móti AB. Her fekk AB tó eitt mál, men tá B36 hinvegin skoraði 11 ferðir, so var allur ivi beindur av vegnum. Her kann annars nevnast, at Ása á Neystabø sat á beinkinum hjá B36 allan fyrra hálvleik, men seinna umfarið skoraði hon ikki færri enn sjey av málunum hjá B36.

Sum nevnt, so varð dysturin millum VB og B71 útsettur, orsakað av verkfallinum, og verður hesin væntandi spældur, so skjótt verkfallið er av.